# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling - djúpt. Túrur nr. 1842
# 12/09-26/09-2018

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Jens Arni Thomassen, Regin Kristiansen, Sjúrður Hammer og Lise Helen Ofstad.

**Ábyrgd:** Lise Helen Ofstad (toktleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna botnfisk á djúpum leiðum. Áherðsla varð løgd á at kanna m.a. brosmu, blálongu, gulllaks, stinglaks, langasporl, trantkongafisk og svartkalva. Hitin við botn varð skrásettur.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 40 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 120 m breitlar og Vágslemmar. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru ikki av Havnini fyrr enn klokkan 15 sunnudagin 16/9, av tí at trolsondan mátti umvælast. Og meðan skipið var á beding til umvæling av trolsonduni, vórðu aðrar umvælingar gjørdar eisini og botnurin vaskaður og málaður. Vit byrjaðu við at taka støðir í ein landsynning úr Munkagrunninum, so suður av Munkagrunninum, á Wyville Thomsonrygginum, vestur av Munkagrunninum, á Føroyabanka, Bill Baileybanka (Ytrabanka) og Lúsabanka (Ytstabanka) (Mynd 1). Tann 21. september varð neyðugt at taka trolið inn eftir 30 minuttum, av tí at ein maður gjørdist sjúkur og mátti í land. Byrjaðu at sigla inn av Lúsabanka umleið kl. 17:30. Komu á Havnina kl. 12 tann 22. september. Loystu aftur kl. 17 og settu kós í ein útsynning úr Mykinesi. Náddu tó bert at taka eitt hál, áðrenn tað aftur gjørdist neyðugt at sigla til lands. Hesaferð orsakað av, at eitt oljurør til trolpælið fór, sum tað ikki eydnaðist at umvæla á staðnum. Byrjaðu at sigla inn sunndag 23. september kl. 6. Løgdu at á Havnini kl. 12. Restin av túrinum varð avlýst, av tí at oljurørið mátti skiftast og hetta ikki varð liðugt áðrenn tíðin var úti.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bústig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bústig 1-5, egin) og stinglaks (bústig 1-5, Gordon *et al.* 2000).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miða ímóti at alt er klárt í seinasta lagi 1. desember 2018.

**Fyribilsúrslit:** 78 ymisk fiskasløg vórðu skrásett. Um nøgdin í kg pr. støð verður samanborin við hini árini, so er nøgdin av brosmu nærum óbroytt og nøgdin av blálongu, gulllaksi, trantkongafiski, svartkalva, stinglaksi og kubbuta langasporli nakað minni. Eins og undanfarin ár varð gýtandi gulllaksur fingin. Einans 38 støðir vórðu tiknar av teimum 54 ætlaðu støðunum. Eingin av teimum 24 eyka støðunum varð tikin.




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 1842.

**Talva 1**. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum pr. fiskaslag

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| KIKARAFISKUR | 5286.181 | 30 | 9 | 8 |
| SVARTKJAFTUR | 2560.263 | | | 32 |
| HAVMÚS | 2015.052 | | | 27 |
| GULLLAKSUR | 1051.496 | 101 | 56 | 25 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 889.062 | | | 24 |
| TRANTKONGAFISKUR | 559.430 | 107 | 26 | 18 |
| HÝSA | 446.377 | 32 | 16 | 3 |
| SKRUBBHÁVUR | 393.375 | | | 9 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 373.234 | | | 11 |
| BLÁLONGA | 273.535 | 77 | 40 | 17 |
| TINDASKØTA | 239.793 | | | 8 |
| STINGLAKSUR | 199.070 | 51 | 8 | 9 |
| GÓMAHOLSHÁVUR | 197.399 | | | 5 |
| SVARTKALVI | 196.693 | 49 | 26 | 8 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 139.270 | 11 | 1 | 11 |
| GLÍGGJHÁVUR | 129.666 | | | 2 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 126.167 | | | 14 |
| NEVHÁVUR | 122.675 | | | 5 |
| HAVTASKA | 118.470 | 12 | 12 | 8 |
| HALAHVASSA SKØTA | 105.950 | | | 3 |
| LONGA | 76.120 | 17 | 1 | 9 |
| MORA | 75.108 | | | 10 |
| BROSMA | 73.975 | 24 | 8 | 10 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 67.253 | 21 | 5 | 7 |
| SLÆTTHØVD | 62.783 | | | 7 |
| HVALSPÝGGJ | 48.237 | | | 14 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 47.217 | | | 12 |
| BLÁGÓMUR | 34.585 | | | 4 |
| HVÍTASKØTA | 32.835 | | | 2 |
| LÍTLA BROSMA | 30.268 | 1 | | 9 |
| UPSI | 28.625 | 1 | | 4 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 23.669 | | | 8 |
| SVARTFISKUR | 21.244 | | | 3 |
| LÝSINGUR | 20.265 | 3 | 2 | 2 |
| COLLETTS BÚKSVARTI HÁVUR | 19.768 | | | 2 |
| ÚLVFISKUR | 16.624 | | | 4 |
| BLÁRIDDARI | 14.413 | | | 13 |
| RÍSNA LANGASPORL | 12.592 | | | 2 |
| FERBLETTUTA KVOYSA | 12.369 | | | 2 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 9.876 | | | 3 |
| SILVURMURTUR | 9.252 | | | 9 |
| LÁLLA | 8.868 | | | 5 |
| ROGNKELSI | 5.275 | | | 1 |
| SANDSKØTA | 5.080 | | | 2 |
| GLÝSUFISKUR | 4.883 | | | 2 |
| GLASKVOYSA | 3.506 | | | 2 |
| FJAÐURFAGRA HAVMÚS | 3.235 | | | 3 |
| KLÆNASPORL | 3.182 | | | 4 |
| STREYMSILD | 2.214 | | | 1 |
| KLINGRUSKØTA | 2.142 | | | 2 |
| HISTIOTEUTHIS BONNELLII | 1.466 | | | 3 |
| SÆVARANGI | 1.254 | | | 3 |
| MAKRELUR | 1.094 | | | 3 |
| SMÁTINDABAK | 0.630 | | | 2 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| GUNTERS LANGASPORL | 0.579 | | | 3 |
| SLOANS ORMFISKUR | 0.578 | | | 4 |
| HVASSASPREK | 0.521 | | | 2 |
| LÍTLIGLÁMUR | 0.467 | | | 7 |
| MIÐARHAVS LANGASPORL | 0.414 | | | 1 |
| LÍTLA LAKSATOBIS | 0.387 | | | 2 |
| TRÝNISÁLLUR | 0.315 | | | 2 |
| LOLIGO | 0.288 | | | 1 |
| PASIPHAEA SP. | 0.209 | | | 10 |
| SNÍPUÁLLUR | 0.201 | | | 3 |
| SPEGILSPRIKKAFISKUR | 0.193 | | | 1 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0.152 | | | 3 |
| RÆKJA | 0.095 | | | 2 |
| BLÁLAKSUR | 0.087 | | | 2 |
| SCOPELOGADUS BEANII | 0.067 | | | 3 |
| MJÁIKJAFTUR | 0.057 | | | 3 |
| KNURRHANI | 0.053 | | | 2 |
| STÓRA LAKSATOBIS | 0.045 | | | 1 |
| KLÓGVHØGGUSLOKKUR | 0.040 | | | 1 |
| KROKODILLUPRIKKAFISKUR | 0.038 | | | 2 |
| NEBBASILD | 0.028 | | | 1 |
| SMÁSKRUBBUTI GLÁMUR | 0.015 | | | 1 |
| BOA-DREKAFISKUR | 0.015 | | | 2 |
| GESTFISKUR | 0.006 | | | 3 |
| STÓRI PRIKKAFISKUR | 0.005 | | | 1 |
| KRILL | 0.002 | | | 1 |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0.002 | | | 1 |
| LAKSSILD | 0.001 | | | 1 |
| SEILUR | 0.001 | | | 1 |
| YMIST(ostur, skrambul v.m) | 581.653 | | | |
| Tilsamans | 16789.579 | 537 | 210 | |

**Viðmerkingar:** Ymiskir forkunnugir fiskar o.a. vórðu fryst til Vísindavøkuna. Harafturat vórðu 34 "sjáldsamir" fiskar tiknir til fiskasavnið hjá Tjóðsavninum. 100 íleguprøvar av trantkongafiski vórðu tiknir til eina verkætlan, og ein ADCP varð sett út í Bankarennuna (støð 18420021). Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

Lise H. Ofstad